Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 25.09.2025 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Per Martin Gregersen<br>Magnus Skoralíð<br>Hanna Jensen<br>Ann Fuglø<br>Heri Mikálsson<br>Pól í Skorini<br>Unn Jarnskor Ellingsgaard<br>Tórur Didrik Djurhuus<br>Uni Rasmussen |
| Varalimir: | Magnus Skoralið hevur boðað frá at hann ikki kann møta til fundin. Næstvaldi á lista V, Hugo Skorastein tekur sæti fyri hann. |
| Ikki møtt: | Unn Jarnskor Ellingsgaard |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerð:** | | | |
| 48/25 | 25/00360-4 | Umnsókn um byggiloyvi til høll - matr. nr. 169a í Leirvík | 3 |
| 49/25 | 25/00324-2 | Til ummælis - Umsókn um keypa av lendi - matr. nr. 194a í Leirvík - Búnaðarstovan | 5 |
| 50/25 | 25/00346-2 | Umsókn til ummælis - Marknaumskipan matr. nr. 5 , 12a og 30a Gøtugjógv - Umhvørvisstovan | 6 |
| 51/25 | 25/00410-1 | Svimjihylurin í Leirvík - Reglugerð fyri vælveruøkið og svimjihylin | 7 |
| 52/25 | 25/00430-1 | Fíggjarætlan 2026 | 8 |
| | | | |

**Til viðgerð:**

## 48/25 Umnsókn um byggiloyvi til høll - matr. nr. 169a í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 16.09.2025 | 6/25 | 25/00360-4 |
| 2 Byggi - og býarskipanarnevnd | 17.09.2025 | 25/25 | 25/00360-4 |
| 3 Fíggjarnevnd | | | 25/00360-4 |
| 4 Býráðið | 25.09.2025 | 48/25 | 25/00360-4 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn frá einum felag, sum virkar innan fiskivinnu á havnarlagnum í Leirvík, um loyvi at byggja ein goymslubygning á havnarlagnum. Talan er um part av matr. nr. 169a, og ætlaða byggiøkið er gamla ruskplássið. Økið verður í dag nýtt til goymslu av reiðskapi hjá trolbátunum á staðnum, og tað er sama felag, sum eigur henda reiðskap.<br><br>Tað økið, sum søkt verður um at seta goymsluhøllina á, liggur í C2-øki. Sambært planinum kann økið nýtast til vinnu, handil, bústovnar, bústaðir og skrivstovur í umhvørvisflokki 2 og 3.<br><br>Ætlanin er at byggja eina høll á 412 m².<br><br>Á sama øki eru eisini nakrir skúrar, sum havnarmeistarin brúkar til goymslu av reiðskapi til rakstur av havnini í Leirvík. Tí verður mett, at umráðandi er, at hesir skúrar verða verandi sum partur av dagliga rakstrinum á havnarlagnum.<br><br>Viðfest eru umsókn og tekningar. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| 100-200 tkr. Til íbingding og asfaltering av uttanumøkinum. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at geva loyvi at staðseta goymsluhøllina á matr. nr 169a sum víst á korti, og at verandi skúrar verða varðveitir til raksturin í havnalagnum. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 17. september 2025**

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum, treyta av at bygningurin verður fluttur longur frá sjóvarmálanum.

**Vinnunevndin 16. september 2025**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum, treyta av at bygningurin verður fluttur longur frá sjóvarmálanum.

**Býráðið 25. september 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og byggi- og býarskipanarnevndini.

## 49/25 Til ummælis - Umsókn um keypa av lendi - matr. nr. 194a í Leirvík - Búnaðarstovan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 17.09.2025 | 23/25 | 25/00324-2 |
| 2 Býráðið | 25.09.2025 | 49/25 | 25/00324-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn frá Búnaðarstovuni dagfest 26. juni 2025, har kommunan verður biðin um ummæli eina umsókn um keyp av parti av matr. nr. 194a í Leirvík.<br><br>Eigari av matr. nr. 194a er Føroya Jarðargrunnur, og er nevndi partur útleigaður gjøgnum Búnaðarstovuna. Á økinum er bygt eitt neyst.<br><br>Ætlanin við umsóknini er at selja tann partin av matr. nr. 194a, har tað sunnasta neystið er staðsett, og at hesin partur fær egið matrikulnummar.<br><br>Umrødda stykkið/neystagrundin er staðsett í Leirvík, beint innan fyri Fjøruvegin.<br><br>Skjøl í málinum eru viðfest. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at geva Búnaðarstovuni loyvi at selja tann partin av undirlendinum av matr. nr. 194a har neysti er bygt. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 17. september 2025**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 25. september 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 50/25 Umsókn til ummælis - Marknaumskipan matr. nr. 5 , 12a og 30a Gøtugjógv - Umhvørvisstovan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 17.09.2025 | 24/25 | 25/00346-2 |
| 2 Býráðið | 25.09.2025 | 50/25 | 25/00346-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn frá Umhvørvisstovuni dagfest 18. juli 2025, har heitt verður á kommununa, um at viðgera eina umsókn um marknaðarumskipan.<br><br>Ætlanin er at leggja 6 fermetrar av matr. nr. 12a aftrat matr. nr. 30a við Gøtugjógv.<br><br>Sí viðfestu skjøl. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at samtykkja umsóknina. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 17. september 2025**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 25. september 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipaarnevndini.

## 51/25 Svimjihylurin í Leirvík - Reglugerð fyri vælveruøkið og svimjihylin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 17.09.2025 | 26/25 | 25/00410-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | | | 25/00410-1 |
| 3 Býráðið | 25.09.2025 | 51/25 | 25/00410-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Umsitingin hevur gjørt eina reglugerð fyri svimjihøllina og vælveruøkið.<br><br>Reglugerðin fevnir um upplatingartíðir, gjøld og møguleikar fyri útleigu av vælveruøkinum. Eisini verður greitt frá, hvørjir fyrimunir vælveruøkið kann hava fyri kroppin.<br><br>Sí viðfestu reglugerð. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at taka undir við reglugerðini fyri svimjihøllina og vælveruøkið. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 17. september 2025**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 25. september 2025**
Málið tikið av skrá.

## 52/25 Fíggjarætlan 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.09.2025 | 52/25 | 25/00430-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.09.2025 | 37/25 | 25/00430-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi skjøl til 1. viðgerð av fíggjarætlan fyri 2026 |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at beina málið í føstu nevndinar til víðari viðgerð. |

**Fíggjarnevnd 22. september 2025**
Fíggjarnevndin mærlir til at beina málið í føstu nevndirnar til viðari viðgerð

**Býráðið 25. september 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

fundurin lokin kl. 19.30

Per Martin Gregersen

Hugo Skorastein

Hanna Jensen

Ann Fuglø

Heri Mikálsson

Pól í Skorini

Unn Jarnskor
Ellingsgaard

Tórur Didrik Djurhuus

Uni Rasmussen